

Fríggjakvøldið kl. 22.05

Feodora

Filmurin »Feodora« er gjørdur í 1978, og er ein syrgilig søga, sum Billy Wilder, kendi filmstjórin í Hollywood, hevur staðið fyri. Hann skapti m.a. eisini filmin »Sunset Boulevard«, »Ingen er fuldkommen« og »Avanti«.

Í »Feodora« eins og í »Sunset Boulevard«, sigur Billy Wilder frá kendari sjónleikarkvinnu Feodoru, sum livir í einbýli á eini oyggj í Grikkalandi. Hon hevur einki samband við Hollywood umhvørvið, har hon hevur vunnið so stórar sigrar við filmum sínum.

Ein filmmaður úr Hollywood kemur ein dag at vitja. Hann lokkar Feodoru at átaka sær høvuðsleiklutin í filmi »Anna Karerina«. Trupulleikin er bert, at nøkur góð fólk, sum hava átikið sær at ansa eftir kendu sjónleikarkvinnuni, royna øll kynstur, so filmstjórin ikki sleppur í samband við Feodoru. Tað letur til, at ein lækni og ein greivinna, hava sett sær fyri, at eingin skal sleppa til hennara.

Nú kemur fram, at Feodora verður kúgað av »vinum« sínum, og at hetta er syrgiliga loyndarmálið um kendu sjónleikarkvinnuna.

Martha Keller hevur leikpartin sum Feodora og William Holden, sum spældi við »Sunset Boulevard« fyri 30 árum síðan, hevur eisini ein leikpart. Hinir leikararnir eru: José Ferrer og Hildegard Knef.

sjónvarp

Fríggjadagin 24. august

19.30	*Radisurnar*
20.00	*Dagur og vika*
20.30	*Ein dagur í London*
21.20	*Skapa tær*
22.05	*Feodora — am. filmur*
0.00	*Liðugt*

Fríggjakvøldið kl. 20.30

Ein dagur í London

Sjónvarpssendingin byrjar við vitjan í Covent Garden, har áður grønmetistorgið hevði til húsa. Her vóru eisini upprunaliga tey fyrstu sjónleikarhúsini. Tað verður sagt, at Covent Garden, sum var stovnað umleið ár 1700, var nýtímans staðið í London, sum fekk ávirkan á, hvussu býarplanurin seinni myndaði seg.

London er eisini kendur fyri serligu forngripasølur í einum býarparti, har sunnudagsmarknaður er í Kings Road. Upptøkur eru eisini gjørdar í St. Albands, sum er hugnaligur býur uttanfyri London, ið varð stovnaður av rómverjum. Siggjararnir fáa eisini innlit í enskari matgerð og at enda verður vitjað á býarsavni í London.

Fyri børn fríggjakvøldið kl. 19.30

Radisurnar

Filmurin hesaferð hevur heitið: »Tað er tín hundur, Sørin Bruun«, og er tað sjálvsagt Nuser, tað snýr seg um. Hann hevur verið so ómøguligur í seinastuni,og Sørin Bruun tekur tí tungu avgerð at senda Nuser aftur, haðani hann kom, — nevniliga á hundaheimið Summardái. Á ferðini skal Nuser gista hjá Rikku, men tá hann er komin innar hjá henni, vil hann ikki fara avstað aftur. Nuser dugir at njóta serligu umstøður sínar, og Rikka vartar hann upp í tríggjar dagar... Tá tímir Rikka ikki meira og biður Sørin Bruun koma eftir Nuser. Hundurin vil bara ikki fara frá Rikku, tí hann hevur havt tað so hugnaligt, men so sigur Rikka, at hann skal arbeiða fyri fóðina, og tað hevur ongantíð verið lukkan fyri Nuser...



Politisk byrjan

Áðrenn teknisøgan byrjaði týskvøldið, setti eitt Fokker Friendship flogfar seg á vøllin í Vágunum. Ein framúr góð upptøka, men hvat var orsøkin til, at flogfarið, uttan nakra frágreiðing av nøkrum slag, soleiðis hekk leyst í luftini í sjónvarpinum?

Sjónvarpið fyri tilkomna ættarliðið var sera dapurt hetta kvøldið, men Søren Bruun, — ella Brúni Sørin, sum Zacharis Hammer hevur valt at kalla hann, var sum altíð góður.

Hetta er ein av teimum best hóskandi teknisøgunum fyri smærri børn, tí hon er ikki hardrend. Tað eru annars allar hinar av slíkum slag. Høvdu vit umsett tilfar av slíkum slag, áðrenn sjónvarpið kom, so hevði Søren Bruun ella Charlie, sum hann eitur í heimlandinum, helst fingið hepnari navn á føroyskum. Tað kundi hugsast, at umsetingin frá upprunamálinum hevði verið betri, tá tað endiliga skuldi gerast. Bruun ella Braun er eftirnavn hjá kenda teknipersóninum. Við at seta »Brúna« frammanfyri, — óansæð um hann eitur Sørin, Charlie, Kristian ella Karl, so verður tað meira eitt eyknevni! Tað er heppið, at Sjónvarp Føroya hevur fingið nakrar góðar menn at standa fyri sjónvarpstíðindum, og hartil serkønar á sínum øki. Jógvan Jespersen her helst ein tann besti til frágreiðing úr Tinginum. Bert spell, at hann datt í somu veit, sum danir kalla tað, tá jornalistar gerast »mikrofonhaldarar« fyri einkisigandi politikarar. Tað kundi hugsast, at Jógvan Jespersen hevur sett politikarunum ein einfaldan spurning, og at hesir so skuldu siga nøkur vælvald orð, men alt druknaði í valstríðkendum orðafloymi, sum eingin fekk nakað burturúr, — sjálvt Sambandið bað Gud hjálpa okkum.

Og so var tað Adolf Hanse, sum ætlaði at tosa frá røðarapallinum um alt tað, sum løgmaður ikki segði í løgmansrøðuni. Hann tosaði um eina sjúku, sum samfelagið hevði fingið og setti spurnartekin við, um tað var sosialisman ella liberalisman sum var atvoldin. Tá slíkar diagnosur skulu setast, so plagar ein ikki at útihýsa nakað fyribrigdi, men Adolf nevndi ikki konservatismuna. Er tað kanska hon, sum hevur gjørt um seg, sum Adolf meinti við??

Hatta var so ein byrjan fyri politikarar okkara, og ikki dugdu teir so væl, men tað fer kanska at gangast betur, tá teir hava vant seg við sjónvarpið. Eitt er í hvussu so er vist. Teir noyðast at vanda sær meira um orðini, og ikki standa og tosa í gátum í fleiri minuttir. Tað ger seg ikki á skerminum, sum avdúkar meir enn nakar annar fjølmiðil.

Áhugavert var at hoyra um seyðasjúkuna, og at upptøkur eisini vóru gjørdar. Eg gjørdist bara so forvitin av, at djóralækninum og J.A. báðir eygleiddu (seyð?), sum vit als ikki fingu loyvi at siggja halaferðina av. Í grundini ógvuliga skemtiligt, um tað ikki var talan um sjúku. Ótrúligt, at fólk rópa eftir donskum tíðindum, tá vit fáa fleiri føroysk tíðindi í sjónvarpinum, enn útvarpið er ført fyri at senda. Í morgun var sum vanligt, bert útlendsk tíðindi í útvarpinum, og tað tú ikki fært at vita har, er helst ikki vert at vita, — tá tað snýr seg um uttanlandsredaktiónina.

Bert kunngerðir og veðurvánirnar vóru at hoyra úr okkara samfelag. Við hetta lag, skal sjónvarpið helst fara at gera gagn. Ikki hevði tað veri verri, um ein ávís kapping kom burturúr.

SV-aktuelt um viðurskiftini millum Danska Monopolstýrið, sum er stovnur undir landinum, ið kannar fyritøkur, var áhugavert, men ivasamt um tað var so hóskiligt fyri føroysku siggjararnar. Kanska politikarar sóu sendingina, so teir av dønum kunnu læra, hvussu eitt kjak myndar seg, har tað bert ræður um at koma fram við sínum sjónarmiðum. — Jú, teir duga eisini at tala í tungum í Danmark, bert gongur tað við rúkandi ferð, og tá sovnar tú ongantíð frammanfyri skermin.

Dagny Joensen